

## Jónas gevst í Frem

Jónas Tór Næs heldur ikki fram í danska 1. deildarfelagnum Frem, tá ið sáttmálin gongur út við árslok. Jónas fekk í summar eitt tilboð frá Frem um at skriva nýggjan sáttmála, men hann var ikki nøgdur við tilboðið og takkaði nei. Síðani spældi hann tríggjar dystir á liðnum, áðrenn hann varð settur av, og hann hevur als ikki verið upp á tal síðani, hóast hann undan vrakaði tilboðnum var fastur maður á liðnum.

- Eg leiti mær nú eftir einum nýggjum felag, og eg ætli mær at halda fram at spæla í Danmark. Ætlanin er ikki at koma heim til Føroya at spæla, hóast tað ongantíð ber til at útiloka nakað, sigur Jónas Tór Næs.

## Formuladeildin, seinasta umfar

| | | |
|---|---|---|
| 21/10 | HB-ÍF | Petur Reinert |
| 21/10 | EB/Str.-KÍ | Dagfinn Olsen |
| 21/10 | NSÍ-B68 | Eiler Rasmussen |
| 21/10 | Skála-VB/S | Lassin Isaksen |
| 21/10 | GÍ-B36 | Páll Augustinussen |

Allir dystirnir byrja kl. 15.00

# Gull og niðurflyting eru á skránni

**Fuglfirðingar fokusera upp á møguleikan at sleppa undan niðurflyting, og í HB verður tað roknað sum super eykavinningur, um silvur í morgin verður til gull**

HB-ÍF

*Eyðun Klakstein*

Fyritreytir vera ymiskar í Gundadali í morgin. HB hevur tryggjað sær silvurmerkini, og um tað fer at vilja heilt væl til, so kann talan gerast um gull. ÍF hevur annað beinið í 1. deild. Um teir fáa øll stigini, so er møguleiki fyri, at teir fara at bjarga sær rættin at halda fram í Formula deildini.

Í HB eru allir spælararnir tøkir. HB hevur ikki tapt ellivu tær seinastu ferðirnar í landskappingini ella síðani Rógvi Jacobsen kom aftur úr Íslandi.

- Vit eru sera væl nøgdir við kappingarárið. Serliga síðani Rógvi kom aftur, hevur tað riggað væl. Ímóti ÍF fara vit at arbeiða hart fyri at vinna. Vit rokna við, at úrtøkan verður silvur, men sjálvandi fara vit at fylgja við í, hvussu tað fer at ganga hjá klaksvíkingum á Eiði, sigur Jákup á Borg í HB.

Í ÍF er Bartal Eliasen tøkur aftur eftir, at hann var leikbannaður ímóti EB/Streymi. Tórður Lervig er eisini tøkur aftur eftir skaðasteðg. Ivi er um Høgna Zachariassen. Orsaka av trupulleikum við rygginum noyddist hann tíðliga av vøllinum ímóti EB/Streymi. Høgni hevur ikki vant í vikuni, men tað verður vónað, at hann verður førur fyri at spæla í morgin.

- Vit fara á vøllin fyri at vinna øll stigini,og vit rokna við, at um tað fer at eydnast, so fara vit at halda fram í bestu deildini. Vit rokna tað rættuliga sannlíkt, at B68 og VB/Sumba fara at fáa tað torført í Runavík og á Skála, heldur Høgni Zachariassen í ÍF.



**Formula-deildin**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 EB/S | 26 | 16 | - | 6 | - | 4 | 63 | 29 | 34 | 54 |
| 2 HB | 26 | 15 | - | 7 | - | 4 | 59 | 36 | 23 | 52 |
| 3 B36 | 26 | 12 | - | 8 | - | 6 | 43 | 31 | 12 | 44 |
| 4 KÍ | 26 | 11 | - | 9 | - | 6 | 53 | 39 | 14 | 42 |
| 5 GÍ | 26 | 10 | - | 11 | - | 5 | 38 | 32 | 6 | 41 |
| 6 NSÍ | 26 | 11 | - | 6 | - | 9 | 48 | 39 | 9 | 39 |
| 7 Skála | 26 | 7 | - | 9 | - | 10 | 32 | 28 | 4 | 30 |
| 8 VB/S | 26 | 5 | - | 4 | - | 17 | 23 | 72 | -49 | 19 |
| 9 B68 | 26 | 4 | - | 6 | - | 16 | 34 | 56 | -22 | 18 |
| 10 ÍF | 26 | 4 | - | 4 | - | 18 | 29 | 60 | -31 | 16 |

## Tvey vælmannað lið

**EB/Streymur hevur fyri fyrstu ferð í rúma tíð allar mans tøkar, og kunnu tí stilla við sterkastu manning. Hjá KÍ eru onkur smærri ivamál, men eisini har rokna tey við øllum leikarum**

UPPTAKT

*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Tað eru tvey vælmannað lið, sum fara á vøllin leygardagin til ársins seinasta landskappingardyst. EB/Streymur spælir fyri gull, KÍ fyri bronsuni og tí kunnu vit rokna við, at allir mans bjóða seg fram, tá liðini skulu setast – eisini teir sum hava onkran minni snudd, tí nú skal slagið standa, og so kunnu teir hava ilt aftaná.

EB/Streymur hevur fyri fyrstu ferð í langa tíð allar mans tøkar. Seinasta dyst var Marni Djurhuus leikbannaður, men hann er so aftur við nú.

Bárður Olsen hevur verið úti leingi við skaða, men var við í Fuglafirði. Hann er eitt sindur eymur í knænum nú, men á Mølini rokna tey við honum leygardagin.

Klaksvíkingar hava eisini onkrar menn, sum dragast við minni snuddir. Erling Fles datt í vikuni undir venjing og meiddi sær økslina. Tí er hann ivasamur og tað sama er Sinisa Jovanovic, sum ikki var við í móti GÍ orsaka av skaða. Men klaksvíkingar bæði vóna og vænta, at hesir báðir vera við leygardagin.

Ein annar leikari, sum heldur ikki var við í móti GÍ, var Høgni Madsen. Hann var leikbannaður tá, men er nú tøkur aftur.

Við øðrum orðum, so eru allir mans helst tøkir leygardagin. Onkur minni ivamál, men tá dysturin skal spælast vilja helst allir sleppa upp í part hóast alt.

# Toppdystur og brak um Havnina

**Hjá monnunum vera fleiri toppdystir á skránni, men serliga í Havn verður brak, tá Fleyr og Fram bresta saman. Hjá kvinnunum verður toppdystur í Trongisvági, har KÍF vitjar TB.**

FLOGBÓLTUR

*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Hjá monnunum skulu øll liðini í eldin, og fleiri toppdystir eru á skránni. Hjá kvinnunum eru eisini fleiri spennandi dystir á skránni, men størsti spenningurin tykist vera í Trongisvági, har TB tekur ímóti KÍF.

### Fleyr og Fram berjast um Havnina

Hjá monnunum vera tveir toppdystir leygardagin. Her møtast ÍF og Mjølnir á Kambsdali, meðan Fleyr og Fram hittast í Havn. ÍF eru ósigraðir í ár, meðan Mjølnir hevur tvey stig av fýra møguligum. Hesi bæði liðini ætla sær heilt víst sigurin leygardagin, tí vinnarin leggur seg fram í oddin.

Í Havn hittast bæði havnarfeløgini Fleyr og Fram í einum spennandi dysti. Bæði liðini vunnu sínar fyrstu dystir, so vinnarin kann leggja seg heilt fram í oddin. Hesin dysturin er eisini fyrsta slagið um Havnina í nógv ár, tí Fram hevur ikki verið partur av bestu mansdeildini seinastu árini.

Sunnudagin vera aftur tveir dystir á skránni. Her møtast bæði botnliðini, SÍ og Nøvan, í Sørvági, og her er SÍ stórfavorittur at vinna dystin. Í hinum dystinum møtast ÍF og Fleyr á Kambsdali.

### Toppdystur á Tvøroyri

Hjá kvinnunum vera tveir dystir á skránni leygardagin, og serliga dysturin í Trongisvági tykist spennandi. Her tekur TB ímóti KÍF. Bæði liðini vunnu sínar fyrstu dystir, og KÍF hevur júst vunnið FK-kapingina. TB plagar tó at klára seg sera væl í Trongisvági, og tí kunnu kvinnurnar úr Kollafirði vænta sær dygga mótstøðu.

Hin dysturin er á Kambsdali, har ÍF tekur ímóti Mjølnir. Hesi liðini taptu bæði í fyrsta dystinum, og tí hevur tað stóran týdning fyri bæði at vinna dystin leygardagin.

Sunnudagin er enn eitt brak, tá bæði vágaliðini, Dráttur og SÍ, bresta saman á Giljanesi. Dráttur vann við bit og slit fyrsta dystin, meðan SÍ tapti í Kollafirði. Í eini slíkari grannauppgerð fara bæði liðini at leggja nógv fyri í teirra royndum at vinna dystin. Hin dysturin sunnudagin verður á Kambsdali, tá ÍF tekur ímóti TB. Her er TB favorittur, men ÍF kann meir enn so taka TB á bóli í hesum dystinum.